

# Ocean´s 11

**Ocean´s 11 er stórfilmurin á Canal+ leygarkvøldið 13. septembur og leikstjórin er Steven Soderbergh**

**CANAL+ 13. septembur kl. 19.00**

Hesin er tann einasti leikstjórin, sum hevur havt tveir av sínum filmum innstillaðar til somu Oskarhandanina, fyri Best Picture og Best Director. Hetta var í



sambandi við filmarnar Erin Brockovich og Traffic. Væl hóskandi er Ocean´s Eleven tann 11. filmurin hjá Søderbergh. Áðrenn koma Traffic, Erin Brockovich, The Limey, Out of Sight, Gray´s Anatomy, Schizopolis, The Underneath, King of the Hill, Kafka og Sex, Lies and Videotapes.
Soderbergh er føddur í Georgia og uppvaksin í Baton Rouge, Louisiana og byrjaði at gera film sum 13 ára gamal. Eftir High School fór hann til Los Angeles, har hann arbeiddi sum freelance útgávufólk, síðan vendi hann aftur til Baton Rouge har hann helt á fram við at gera stuttfilmar og skriva filmshandrit. Soderbergh gjørdi vart við seg, tá hann framleiddi ein konsertfilm um rokkbólkin Yes. Úrslit varð 9012LIVE og filmurin bleiv innstillaður til eina Grammy virðisløn í 1986. Men hann helt á fram við at skriva handrit, og í 1988 skrivaði hann Sex, Lies and Videotape, sum vann

*"Tað vóru tveir sera intensir dagar við filmsupptøkum av nøkrum túsund statistum og okkara roynd at tilrættisleggja ein ruðuleika... Lennox og Vlad vóru fínir og púra kuul, tí tað síðsta eg vildu hava var ein ella onnur ósemja millum tveir sera stórar menn í einum boksiringi."*





Palme d´Or á Cannes Film Festival. Her leikti m.a. Andie MacDowell við, sum er kend frá Fýra brúdleyp og ein jarðarferð.

George Clooney og Soderbergh hava samstarvað síðan 1998, tá Clooney leikti høvuðsleiklutin saman við Jennifer Lopes í Out of Sight. Hetta var ein undirhaldandi og nógv róstur filmur tað árið. Í 2000 stovnaðu Søderbergh og Clooney filmsfelagið Section Eight, ið hevur høvuðsstøð hjá Warner Bros. Úr hesum samstarvinum eru kendir og væleydnaðir filmar komnir burturúr, t.d. Insomnia við Al Pacino og seinast Solaris við George Clooney. Hetta er ein endurframleiðsla av russiska stórfilminum við sama navni, sum varð bygdur á skaldsøguna hjá Stanislaw Lem og leikstjórnaður av Andrei Tarkovsky í 1972.

**Ocean´s 11**

| | |
|---|---|
| **Leikarar:** | George Clooney, Brad Pitt, Matt Damon, Julia Roberts, Andy Garcia, Lennox Lewis... |
| **Leikstjóri:** | Steven Soderbergh |
| **Tónleikur:** | David Holmes |
| **Studio:** | Warner Bros. |
| **Útgávuár:** | 2001 |

**Filmurin**
Ocean´s 11 er ein endurframleiðsla av filminum frá 1960 við sama navni, har stóru stjørnurnar, saman kendar sum The Rat Pack, Frank Sinatra, Dean Martin og Sammy Davis Jr. leiktu við. Men leikaramanningin á Oceans 11 frá 2001 er eisini fylt við filmsstjørnum sum George Glooney, Brad Pitt, Matt Damon, Andy Garcia og Julia Roberts.

Danny(Clooney) og hansara besti vinur Rusty Ryan(Pitt) fara landið runt fyri at rekrutera níggju mans av líknandi slagi, sum teir sjálvir, men tó við hvørjum sínum serligu snildum. Danny er maðurin við ætlanini og júst komin út úr geglinum. Ætlanin er at rána trý hátryggjaði kasino í Las Vegas undir nevaleiksdysti millum Lennox Lewis og Wladimir Klitschko. Tað er í eini serligari pengaboks undir jørð, at hvørt oyra, ið tey trý kasinoini vinna, verður goymt.






